

# 3.000 mia. krónur afturat í norska oljugrunnin

**Jan Müller**

05.05.2014 - 17:24

Oljan.fo

Tey næstu tíggju árini fara 3.000 milliardir krónur at renna í norska oljugrunnin. Við verandi reglum merkir tað, at um tíggju ár kunnu norskir politikarar brúka 122 milliardir krónur meiri úr grunninum enn í ár. Seta vit hetta í samband við donsk viðurskifti, merkir tað, at norðmenn kunnu byggja tríggjar Stórabeltsbrýr um árið kontant, skrivar Børsen.

Tað er Kim Blindbæk í danska Sydbank, sum hevur gjørt útrokningina fyri Børsen. Hann sigur við blaðið, at hann hevur tikið hædd fyri, at summi ár kunnu vera góð og onnur minni góð, men hann ivast ikki í, at pengamongdin í grunninum fer at veksa, tí tey, sum stýra grunninum, eru sera dugnalig til at gera tær røttu íløgurnar, sigur hann.

Gongdin hjá norska oljugrunninum hevur eisini áhuga í Danmark, tí fleiri danskar fyritøkur kunnu fáa gagn av norskum íløgum, skrivar Børsen. Blaðið vísir á, at higartil hava teir

norsku politikararnir játtað 600 milliardir krónur til íløgur í samferðslukervið tey næstu tíggju árini, og okkurt danskt felag hevur fingið arbeiðsuppgávur í hesum sambandi.